## Beckham á vøllinum aftur

David Beckham hevur havt eina misjavna eydnu í Los Angeles. Hann hevur havt ein drúgvan knæskaða, og hevur tí ikki enn verið tann fongurin, sum leiðslan í LA Galaxy hevði vónað. Men nú bragdar kanska hjá Beckham? Í dystinum millum LA Galaxy og New York Red Bulls kom Beckham á vøllin eftir 68 minuttir. Hann gjørdi tó ikki so stóran mun, og tað sást, at hann ikki hevði nakra serliga dystarvenjing. Dysturin endaði við javnleiki 1-1. Galaxy mugu nú vinna síðsta dystin í grundspælinum ímóti Chicago Fire fyri at koma víðari í MLS-endaspælið.



## AaB fekk javnt í toppdystinum

Um vikuskiftið hevði AaB vitjan av FC Keypmannhavn í donsku superliguni. Talan var um toppdyst, og sum ein topddysti líkt, var dysturin tættur og málleysur. FCK hevði leikliga yvirvág, men AaB var eisini við í dystinum, og samanumtikið var javnleikur á góðari leið. Eingin av føroysku spælarunum hjá AaB var á vøllinum, og tað kom illa við hjá AaB, at toppskjúttin, Rade Prica, varð vístur av vøllinum móti endanum av dystinum. Hann fær nú leikbann.

GÍ-Skála 5-0 (3-0):

# Gøtumenn vóru flúgvandi

**Talan var um største sigurin á árinum, tá ið Skála varð sett upp á pláss av GÍ, sum fyri fyrstu ferð í ár fór av heimavøllinum uttan at hava fingið mál ímóti sær**

GÍ-SKÁLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*GÍ*

*Skála*



*GÍ var nógv tað betra liðið á vøllinum í Gøtu sunnudagin*

Tað plagar ofta at vera tætt, tá ið nógvu oyggjauppgerðirnar eru á skránni í Eysturoy. Einki bendi á, at tað ikki skuldi verða soleiðis, tá ið síðsti landskappingardysturin var á skránni í Sarpugerði.

Skála vitjaði, og eftir 25 umfør var munurin millum GÍ og Skála á støðutalvuni millum lítil og eingin.

Men talan gjørdist um rættuligt skrædl í Gøtu, har lágættarvindurin bar við sær, at tað var torført at sýna polerað fótbóltsspæl.

Munurin í spælbýti var kanska ikki so ógvuliga stórur, men í atsóknum á málið og í málum gjørdist munurin so mikið stórur, sum hann ikki áður hevur verið í ár. Hvørki hjá GÍ ella Skála.

GÍ vann 5-0, og hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at gøtumenn fóru av heimavøllinum í ár, uttan at mótstøðuliðið hevði megnað at fingið bóltin í málið aftanfyri stinna málverjan Geza Turi, sum eisini næsta ár fer at verja GÍ málið.

### Álopsparið funnið saman

Fyrstu løtuna bendi einki á, at talan skuldi gerast um so stóran sigur. Hol kom á, tá ið fyrra umfarið var næstan hálvleikt. Stutt horna í vinstru endaði við, at Christian Lundberg sendi innfyri, og Hans Jørgen Djurhuus, sum tykist vera komin seg væl, eftir at skaði leingi hevur darvað, stýrdi bóltin í málið.

Álopsparið hjá NSÍ, Christian Lundberg og Hendrik Rubeksen, hava rættuliga funnið saman, og teir vóru meistarar fyri 2-0 málinum. Vongverjin í høgru, Jónreid Dalheim, sendi høgt og langt fram í brotsteigin. Hendrik Rubeksen fekk tamarhald á, spældi til Christian Lundberg, sum lyfti upp um málverjan og í málið.

Undan steðginum økti heimaliðið til 3-0, og harvið var tað mest sum avgjørt, at stigini fóru at vera í Gøtu. Skálamenn vildu vera við, at Sam Jacobsen gjørdi fríspark, tá ið hann tók bóltin av verjuspælara. Tað metti dómarin ikki, og úr einum 20 metrum sendi miðvallarin bóltin undan vindinum og í meskarnar.

Hesa løtuna hevði GÍ fleiri góðar royndir. Eitt nú rakti Hans Pauli Petersen, sum er ein av teimum, ið hevur verið nógv skaddur, og sum nú er komin seg væl, í stólpan.

Beinanvegin eftir hvíldina økti Christian Lundberg til 4-0, og miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti Hendrik Rubeksen rimmar sigurin. Uppspælinum stóð Tomasz Sajdak fyri, tá ið hann úr høgru sneiddi framvið fleiri.

Tá vóru skálamenn longu undirmannaðir. Teitur R. Joensen hevði sæð reytt. 5-0 til GÍ, sum við úrtøku í Vági leygardagin kann staðfesta fimta plássið.

# Piotr fer í Vágarnar

**Póllendingurin Piotr Krakowski skiftir frá EB/Streymi til FS Vágar at vera venjari**

VENJARI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

FS Vágar og Piotr Krakowski hava skrivað sáttmála sum ber í sær, pólendingurin skal standa fyri 1. liðnum hjá vágamonnum næsta kappingarár. Tað skrivar heimasíðan hjá FS Vágum.

- Sáttmálin varð undirskrivaður longu tann 10. oktober, men við virðing fyri starvinum í EB/Streymi, valdu partarnir ikki at almannakunngera tíðindini beinanvegin, men heldur at bíða til kappingin var av, sigur FS Vágar.

Jan Dam hevur verið venjari hjá FS Vágum í hesum kappingarárinum, men tá ið tað gjørdist greitt, at hann ikki helt fram, fór FS Vágar at leita eftir nýggjum venjara.

Piotr kom til Føroya at leika við B71 seinast í 80-unum. Í nítiárunum gjørdist hann fyrst leikandi venjari og síðani venjari burturav. Seinastu fimm árini hevur Piotr vant EB/Streym, og har vann hann steypakappingina fyrr í ár.

- Sáttmálin, sum varð undirskrivaður 10. oktober er við FS Vágar, men avtalað er, at verður nýggja felagið í Vágum til nakað, verður sáttmálin fluttir yvir higar. Talan er í fyrstu syftu um ein eitt ára sáttmála, men báðir partar vóna tó, at talan skal gerast um eitt drúgvari samstarv enn so, skrivar FS Vágar á heimasíðu sínari.



*Eftir fimm ár í EB/Streymi skal Piotr Krakowski venja felagsliðið í Vágum*